# Tjóðveldið tekur undir við Kalsø



*Kalsø hevur brotið samgonguavtalu, heldur samgongutingmaður*

Mynd: Jens Kr. Vang



*Nei, eg havi ikki brotið nakra samgonguavtalu, sigur Bjørn Kalsø*

Mynd: Jens Kr. Vang



*Heidi Petersen og Tjóðveldisflokkurin ætla sær at atkvøða fyri uppskotinum hjá Kalsø, um tað kemur óbroytt úr nevnd*

Mynd: Jens Kr. Vang

**Tingmaður: – Kalsø lopin frá avtalu**

Jørgen Niclasen segði við Útvarpið fríggjadagin, at landsstýrismaðurin við fiskivinnumálum er lopin frá samgonguavtalu við ásetingini av fiskidøgum.

Ólavsøkudag legði Bjørn Kalsø, landsstýrismaður við fiskivinnumálum, lógaruppskot fram um broyting í løgtingslóg um vinnuligan fiskiskap. Í dag var fyrsta viðgerð í Løgtinginum, og málið er beint í vinnunevndina.

Jørgen Niclasen, tingmaður hjá Fólkaflokkinum og limur í vinnunevndini, sigur við Útvarpið, at ásetingin av fiskidøgum er ikki tað, sum komið var ásamt um í samgonguni, og at landsstýrismaðurin tískil er lopin frá samgonguavtalu.

Í nýggja uppskotinum er útrokningarhátturin broyttur, og ein generellur niðurskurður upp á 2 % í fiskidøgum verður framdur, um uppskotið verður samtykt.

**Kalsø: - Eg havi ikki brotið nakra avtalu**

– Eg dugi ikki at síggja, at eg havi brotið nakra samgonguavtalu, sigur Bjørn Kalsø, landsstýrismaður í fiskivinnumálum, sum ólavsøkudag legði lógaruppskot fram um broyting í lógini um vinnuligan fiskiskap. Jørgen Niclasen sigur, at Bjørn Kalsø við hesum er lopin frá samgonguavtalu.

Tingmaðurin hjá Fólkaflokkinum finnist at landsstýrismanninum í fiskivinnumálum og hansara uppskoti um broyting í løgtingslóg um vinnuligan fiskiskap. Jørgen Niclasen sigur, at ásetta fiskidagatalið er ikki tað, sum samgongan varð samd um, og at hetta tískil er brot á samgonguavtaluna.

Bjørn Kalsø sigur, at hann hevur verið greiður yvir, at Jørgen Niclasen ikki hevur verið samdur við sær í ávísum førum, men at lógaruppskotið als ikki er nakað brot á samgonguavtalu.

– Jørgen Niclasen hevði eitt ynski um, at útrokningarhátturin skuldi broytast, og tað havi eg gjørt. Men tað er latið upp til mín, hvussu útrokningarhátturin skal broytast. Eg havi játta fyri umboðum í samgonguni, at eg vildi broyta útrokningarháttin, og korrigera veiðutrýstið har eftir. Tað havi eg gjørt, og tískil er ongin samgonguavtala brotin, sigur Bjørn Kalsø.

**Tjóðveldið tekur undir við Kalsø**

Størsti andstøðuflokkur á tingi tekur undir við broytingaruppskotinum hjá landsstýrismanninum í fiskivinnumálum.

Heidi Petersen, tingkvinna og framsøgufólk í fiskivinnumálum hjá Tjóðveldisflokkinum, er samd við landsstýrismanninum í fiskivinnumálum og hansara broytingaruppskoti til løggávuna um vinnuligan fiskiskap.

– Tjóðveldisflokkurin tekur undir við uppskotinum hjá landsstýrismanninum, og vit fara at atkvøða fyri uppskotinum, um tað kemur óbroytt úr vinnunevndini, sigur Heidi Petersen.

Jørgen Niclasen, samgongutingmaður, segði við Útvarpið fríggjadagin, at Bjørn Kalsø, landsstýrismaður, hevði brotið samgonguavtalu við broytingaruppskotinum. Bjørn Kalsø hevur víst øllum atfinningum aftur.

**hkm**

# Nógv trýst á Strandferðsluni

Hvør einasti túrur um Leirvíksfjørð til Klaksvíkar hevur verið fultsettur, og Strandferðslan hevur siglt pendulfart alt vikuskiftið.

3.300 fólk vórðu flutt um fjørðin fríggjadagin, og leygardagin vórðu eini 2.000 fólk flutt úr Leirvík til Klaksvíkar.

Andrass Jensen, leiðari á samferðsludeildini hjá Strandfaraskipum Landsins, sigur, at tað hevur verið eitt øgiligt trýst á, men at manningin hevur kýtt seg nógv fyri at fáa tað at bera til. Skipini hava silgt aftur og fram alla tíðina við fullum skipum fyri at fáa fólkið um fjørðin.

Dúgvan og Sam røktu rutuna um Leirvíksfjørð fríggjadagin og leygardagin. Sunnudagin var Ternan komin inn fyri Sam.

## Løgreglan stóra uppgávu

Løgreglan í Klaksvík sigur, at tað gekk stak væl at halda skil á teimum mongu fólkunum, sum høvdu leitað sær norður á Summar Festival um vikuskiftið.

Vakthavandi á løgreglustøðini sigur, at tað neyvan fyrr hava verið so nógv fólk á sama staði í senn í Klaksvík. Festivalurin varð útseldur, og um øll nýttu sítt atgongumerki, so hava eini 7.000 fólk verið á Summarfestivali. Útvarpið segði um vikuskiftið, at eini 8.000 fólk høvdu verið á Summar Festivali. Tískil hevði løgreglan í Klaksvík eina størri uppgávu enn vanligt at røkja.

Men vakthavandi sigur, at tað var stak friðarligt. Fólk skikkaðu sær væl, og ongin harðskapur var at hóma. Talan hevur bert verið um full fólk, sum komu inn at sova. Eini trý av slagnum hava vitjað løgreglustøðina í Klaksvík og sovið sær rúsin av um vikuskiftið.

Fríggjakvøldið hevði løgreglan í Klaksvík 10 mans til arbeiðis, og leygarkvøldið vóru 12 mans á vaktini.

## Proppur í ferðsluni

Summar Festivalurin byrjaði fríggjadagin, og nógvir bilar komu í tí sambandinum til Klaksvíkar.

Løgreglan í Klaksvík boðar frá, at nakrir ferðsluproppar vóru fríggjadagin, men restin av vikuskiftinum gekk av tí besta.

**hkm**